




FILMSTEIGURIN

# Junglebogen 2

Í Disney filminum »Junglebogen 2« svingar frumskógurin enn einaferð við tað jazz glaða stevi hjá Baloo, meðan eitt nýtt ævintýr gerst um hann og mannabarni Mowgli.

Í tí upprunaliga filminum setti Mowgli sær fyri, at fara til síni egnu í mannabygdini. Men hann saknar ta fría lívið í frumskóginum, og ikki minst góða vin sín, bjarnan Baloo. Kenslan gongur báðar vegir, og eina náttina sníkir Baloo seg inn í bygdina, fyri at taka Mowgli við sær inn aftur í frumskógin. Tá teir hittast aftur, er gleðin stór, og teir báðir berjast vinarliga við hvønn annan. Hini íbúgvarnir í bygdini verða kortini bangnir, tá teir síggja Baloo, og teir báðir vinirnir eru noyddir, at rýma inn í frumskógin. Teir leggja ikki merki til, at vinkonan hjá Mowgli, Shanti, og »lítlibeiggi« hansara, Rajan, fylgja eftir teimum, sjálvt um tey vita, hvussu vandamikið tað er í frumskóginum. Tað er tað nú eisini fyri Mowgli, tí gamli fíggindi hansar, Shere Kahn, er afturkomin, og hann hevur hevnd í kvittanum.





# The Ring

Ein bleiktrandi, skiftandi, skínandi ringur. Ein stólur. Deyðir djórakroppar í sjóvarmálanum. Ein stigi. Eitt andlit í einum spegli, og umaftur Ringurin. Tað løgna innihaldið kundi verið ein smart roynd á einum eksperimentalum video.

Men so skjótt sum ein sløkkir, ringir telefonin, og ein rødd sigur, at ein hevur sjey dagar eftir at liva í!

Tað ljóðar sum ein býtt skrøkksøga, tannáringar hava uppfunnið, fyri at ræða aðrir tannáringar, men systkinadótturin hjá Rachel Kellers er júst deyð av ræðslu – og mamman biður Rachel um at finna eina frágreiðing. Leitanin hjá Rachel leiður hana til eitt videoband, sum hon sjálvandi hyggur at. Tíverri!

Granskingin hjá Rachel Kellers mennir seg til eina kapping við deyðan. Ein tryggan, grúðuligan og ræðandi deyða. Uttan so, at hon kann avdúka søguna handan drepandi videobandið.

Naomi Watts er journalisturin Rachel, sum fær eina eyka orsøk at finna út av loynidóminum, tá hennara lítli sonur eisini sær bandið. Martin Henderson spælir vinurin hjá Rachel, Noah, og hansara vitan um video og tøkni fær tey væl á leiðina.

Gore Verbinski hevur leikstjórnað »The Ring«. »The Ring« er bydgur á ein japanskan kult-ræðufilm, sum var tann fyrsti japanski filmurin, ið veruliga var vælumtóktur.


**HAVNAR BIO**

P Tlf. 31 19 56 P

www.bio.fo




**Frumsýning**

Fríggjadagin 07.02. kl. $17^{00}$ — Fríggjadagin 07.02. kl. $18^{45}$
Leygardagin 08.02. kl. $17^{00}$ — Leygardagin 08.02. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 09.02. kl. $16^{00}$ — Sunnudagin 09.02. kl. $17^{45}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




Fríggjadagin 07.02. kl. $20^{30}$ Leygardagin 08.02. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 09.02. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 07.02. kl. $23^{30}$ Leygardagin 08.02. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 09.02. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 07.02. kl. $18^{15}$ Leygardagin 08.02. kl. $18^{15}$
Sunnudagin 09.02. kl. $17^{15}$




Fríggjadagin 07.02. kl. $21^{00}$ Leygardagin 08.02. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 09.02. kl. $20^{00}$

**KOMANDI FILMUR**



Frumsýning Fríggjadagin 14.02.